# Projektmakarí ella serfrøði

EDMUND JOENSEN
løgtings- og fólkatingsmaður



Hvør fær mest burturúr, um ein kommisjón skal setast at viðgera spurningin um valdømini – samfelagið, veljarin ella limirnir í kommisjónini?

Í orðaskiftinum á Tingi verður stundum tikið til, at tingmaður hevur meiningina hjá tí seinasta persóninum, hann møtti.

Tað, sum sipa verður til, er, at viðkomandi løgtingslimur er av tí slagnum, sum skiftur meining, sum politiski vindurin blæsur.

Líkt er til, at sama tiltak kann brúkast, tá umræður onnur. Tað er í øllum førum myndin, sum fæst burtur úr drúgvari, sum Jógvan Mørkøre hevur í bløðunum seinasta vikuskifti.

**“Objektiva” grundarlagið**

Jógvan Mørkøre hevur hitt tvey fólk – í hesum føri tingfólk – ið hava sagt honum, hvussu ræðuliga dýrt tað er vorðið at stilla upp til løgtingsval, og at hetta má vera tí, at Føroyar vórðu skipaðar í eitt valdømi fyri øll fyri uml. tveimum árum síðani.

Hetta “kanningararbeiði” er “objektiva” grundarlagið, ið leiðir samfelagsfrøðingin til ta avgjørdu niðurstøðu, at skipanin við einum valdømið má broytast.

Jawell og stikk den. Vísindaligu prógvini eru komin til høldar, og niðurstøðan hjá serfrøðinginum er: Tingið eigur at seta eina kommissjón at viðgera spurningin um valdømini.

Álvaratos.

Er tað soleiðis samfelagsfrøðingar arbeiða? Kann man sum samfelagsfrøðingur bara tveita nakrar gitingar og illa undirbygdar pástandir út í almenna rúmið og so gera niðurstøður út frá teimum? Hvar eru objektivu upplýsingarnar? Hvussu eru tær fingnar til vega? Hvar er greiningin? Og hvar er seriøsiteturin í slíkari grein sum hesari, vit sóu farna vikuskifti?

**Er hetta projektmakarí?**

Í Tinginum fara alarmklokkurnar at ringja, tá serfrøðingar pikka á dyrnar, bjóða seg fram og tala um, at Tingið má seta eina kommisjón at kanna hetta ella hatta.

Ein spurningur, ið nógv tingfólk tá seta sær, er: er hetta eitt veruligt og neyðugt kanningararbeiði, ið skal gerast, ella er hetta projektmakarí?

Henda spuring eiga vit eisini at seta, nú ein serfrøðingur enn eina ferð tosar um kommisjón.

Tann sentralið spurningurin er: hvør fær mest burturúr, um ein kommisjón skal setast at viðgera spurningin um valdømini – samfelagið, veljarin ella limirnir í kommisjónini?

Mítt boð er, at tað munnu vera kommisjónslimirnir, ið fáa mest burturúr. Frøðingarnir í slíkum kommisjónum eru ikki beinleiðis undirbetaltir. Teir skulu fundast væl og leingi – helst í fleiri ár – og so skulu teir kanska eisini á rannsóknarferðir, áðrenn teir leggja eitt drúgt arbeiði úr hondum.

Alt fyri skattaborgarans rokning. Ger so væl – betal við kassa eitt!

Og gongst sum so ofta, ja so endar kanningin niðast í onkrari skuffu, og avgerð verður tikin út frá øðrum upplýsingum ella atlitum enn teimum, kommisjónin heldur vera tey einastu røttu.

Og so kunnu vit øll ásanna gamla orðatakið: Når fanden ville, at intet skulle ske, nedsatte han en komité.

Nú skal eg als ikki leggja Jógvan Mørkøre undir projektmakarí. Men hetta bendir á tann bógvin.

**Napoleon og Hitler vísa vegin**

Sum rosinan í pilsuendanum nevnir serfrøðingurin Jógvan Mørkøre, at ongin fólkaatkvøða má verða um spurningin um eitt valdømi, tí fólkaatkvøðan kann “misbrúkast sum institutión”.

Dømini hjá honum eru, at Napoleon gjørdi seg til keisara við einari fólkaatkvøðu, og at Adolf Hitler tryggjaði sær sítt nasistiska diktatur við fólkaatkvøðu.

Ja, hvat skuldu vit gjørt uttan slika serfrøði? Hugsið tykkum, hvat Kaj Leo ikki kundi funnið uppá við at skeitt eftir Napoleon og Hitler?

Reglurnar, sum vit deyðiligu lesa tær, siga, at vit kunnu hava vegleiðandi fólkaatkvøður í Føroyum. Hetta amboð gevur Tinginum ábendingar um, hvat veljarin hugsar um ávísar spurningar.

Sjálvandi skal onki misbrúk fara fram, heldur ikki í fólkaatkvøðum.

**Hví eru valstríð dýrkað?**

Nú skal eggið sjálvandi ansa væl eftir ikki at læra hønuna nakað sum helst.

Tó er áhugavert at spyrja, um valstríð eru vorðin so dýr, at bert múgvandi fólk hava ráð at stilla upp – og um so er: hvør er orsøkin?

Mínar drúgvu royndir í politikki siga so mikið, at tað er vorðið nakað dýrari at vera við í valstríðnum til løgtings- og fólkatingsval. Men tó so, at valevni sjálvi gera av, hvussu dýrt tað skal vera.

Tað kostar t.d. onki at vera við í valsendingum í almennu loftmiðlunum, ið hóast alt framvegis munnu hava størstu ávirkanina og týdningin. Tað kostar heldur onki av vera við á valfundum ella valferðum, sum t.d. politisku flokkarnir ella miðlarnir skipa fyri.

Hinvegin: um tú sum valevni skalt hava títt andlit á hvønn steyra í landinum, og tín rødd skal hoyrast í hvørjari lýsing, tín reklama skal berast í hvørt hús í landinum, og lýsing fyri tínari heimasíðu skal blunka á hvørjum internetveggi – ja, so gert tú tað dýrt fyri teg sjálvan. Og lesarabrøvini eru eisini farin at kosta, men ikki so nógv, at nakar noyðist frá húsi og heimi av teirri orsøk.

Í Føroyum síggja vit helst sama rák sum aðrastaðni. Einstøk mál og einstaklingar fylla meira í fjølmiðlunum enn politiskar hugsjónir og politiskir flokkar ella rørslur. Tíverri, halda summi. Tað eru fjølmiðlarnir, ið skapa hesa gongd, tí teirra fokus er soleiðis skipað. Hetta sæst m.a. aftur, tá val er.

Fleiri politiskir flokkar í Føroyum hava ilt við at fóta sær í hesum miðlaskapta politiska veruleika, hóast politikkur í dag fyri stóran part fer fram í miðlum meira enn aðrastaðni.

Tí haldi eg, at tað er tann miðlaskapti politikkurin, sum ger, at einstaklingar hava hug at brúka pengar uppá at profilera seg og síni einstøku mál í einum valstríði.

Sostatt er tað neyvan valskipanin ella hitt eina valdømi fyri øll, sum ger, at val gerast valevnum dýr.

Men sjálvandi: frøðingarnir vita altíð best – serliga í einari kommisjón, har teir sjálvir kunnu skora kassan.

# Nú vit tosa um fólkaskúlarnar...

DÁVID ISFELD
Hósvík



Tá eg gekk í fólkaskúla, fingu vit onga veruliga undirvísing í nútímans Føroyum og nýggjari søguligum hendingum (her meini eg eftir tinglýsingini av grundlógini í 1850), sum hava lagt lunnar undir okkara politik, hugsan og samleikafatan. Eg hugsi um tilburðir, sum t.d. jólafundin í 1888, fólkaatkvøðan í 1946 og klaksvíksstríðið í 1953-55. Míni elstu børn á 14 og 15 ár hava lítið og einki hoyrt um hesar søguligu hendingar. Eg spurdi eisini eini 50 næmingar á Tekniska skúlanum í Havn, um teir høvdu fingið undirvísing í áðurnevndu tilburðum, og næstan øll svaraðu nei.

Jólafundurin, fólkaatkvøðan og klaksvíksstríðið er ikki søgulig propaganda; hetta er søga. Ikki at undirvísa í hesum serstøku og týdningarmiklu hendingum er einki minni enn vansketni av okkara børnum og ungdómi. Upplýsing og innlit í sambands- og fullveldispolitik, og samfelagsskipan sum heild, er næstan ikki til í fólkaskúlanum - tað er stórt sæð tabu. Tað eru onkrir hissini lærarar, ið, av sínum eintingum, siga eitt sindur um fólkaatkvøðuna o.s.fr., men altso uttan veruliga viðgerð við viðkomandi tilfari og teksti, og tað er ikki nokk. Og tað er serstakliga, tá ið lærarar av sínum eintingum taka hesi evni upp, at tað kann fáa politiskan lit. Fólkið skal vera upplýst, og tað er eisini galdandi fyri okkara børn og ungdóm. Tey skulu upplýsast um farnar tíðir fyri at skilja hvat gongur fyri seg og hví. Tog-toganin millum Rasmus Effersøe og Jóanes Patursson skal eisini lýsast í síni heild, og sostatt uttan politiskan lit. Ein lærari eigur at kunna vera so mikið at sær komin, altso professionellur, at hann litleyst kann undirvísa í hesum hendingum uttan at skula vísa politiskan lit.

Nøkur fólk vilja vera við, at fólkaatkvøðan og klaksvíksstríðið eru ov eyn evni fyri mong avvarðandi, men til tað vil eg bert siga, at tað er t.d. 2. heimsbardagi og "Watergate" gølan so sanniliga eisini fyri ávikavist týskarar og Nixon administratiónina og avvarðandi hjá teimum; tískil haldi eg, at tað er sera óseriøst, bæði mentanarliga og søguliga, ikki at undirvísa í okkara egnu søgu í fólkskúlanum.

Týðandi hendingar og politiskir tilburðir í Føroyum eiga at vera ein oblikatoriskur partur av undirvísingini í framhaldsdeildini í fólkaskúlanum - helst í 10. flokki. Henda undirvísing kundi itið: samfelagsfrøði og søguligur samanhangur. Lærarar skulu upplýsa um hesar søguligi tilburðir - hvør skal annars upplýsa føroyingar um føroyska søgu og føroysk viðurskifti, um ikki vit sjálvi? Um føroyingar ikki læra nútíðmans Føroya-søgu, hvør skal so bera hesa søgu víðari? Hvør fer at tíma, tá søgan ikki tykist at hava nakran áhuga, týdning og meining fyri føroyingar? Ungdómurin í dag er sum dottin niður av mánanum. Tey læra alt ov lítið í fólkaskúlanum, ið gevur samfelagsligt og politiskt innlit, fatan og samleika. Hví og hvussu skulu ungdómarnir fyrihalda seg til politik í Føroyum og føroyskan samleika, tá tey ikki hava peiling av, nær og hví Føroya fólk fóru í tvinnar hugsjónarligar politiskar bólkar. Hvussu eru okkara ungdómar skikkaðir til at fara á val, uttan at hava eitt neyðugt vitanar fundament? Hvussu verður “almenn vitan” definera um 10-30 ár, um hetta skal verða mannagongdin av menninginí av okkara ungdómi? Eg haldi, at hetta er at vanrøkja og spilla medviti og sjálvsábyrgdina hjá okkara børnum og ungdómi.

Vit læra lítið annað í fólkaskúlanum um okkara uppruna og søgu enn reypisøgur úr víkingatíð og miðøld, sum eru til, takka verið íslendingum. At áðurnevndu tilburðir ikki eru ein natúrligur partur av søguundirvísingini hjá fólkaskúlanum, og hava verið tigaðir burtur í áratíggju, líkist ongum øðrum enn miðvísari søguavnoktan og tískil eisini søgufalsan. Hvør hevur ábyrgdina av hesum, og nær fær hetta ein enda?

Hetta líkist tí ábyrgdarloysi og líkasælu, sum er alt ov sjónlig í Føroyum – serstakliga hesa síðstu tíðina. Føroyar serstøk tjóð, er einki gott, um tað merkir: Føroyar serstakliga óvitað og ábyrgdarleys tjóð. Minnist til: Tjóðin er ikki betri enn fólkið, ið myndar hana.

Latið okkum skúla okkara børn og ungdóm soleiðis, at tey fáa breiða og holla vitan. Tey mugu læra um okkara uppruna og yngru fortíðina. Tey mugu læra um allar týðandi hendingar fyri at skilja nútíðmans Føroyar. Vit eiga og skula hava álit á, at okkara framtíð, ungdómurin, hevur gott vit og skyn, og tískil kann koma til sínar egnu meiningar og niðurstøður, um hvat gott er fyri Føroyar. Okkara ábyrgd er at læra og hjálpa ungdóminum, men ungdómurin skal sjálvur velja sína leið viðvíkjandi meiningar, avgerðir og virksemi.

# Freistingin var ov stór

HENRIK OLD



Morgunin byrjar við, at Útvarpið boðar frá, at nú skal Rúsdrekkasølan hava opið leygardag.

Mín góði vinur vinur Johan Dahl og Vinnumaálráðið eru væl komin til ta niðurstøðu, at ov lítið kemur í kassan hjá Rúsuni, og tí ræður um at hava opið leygardag eisini – helst besti søludagur av øllum.

Tá ið Rúsdrekkasølan var samtykt fyri skjótt 20 árum síðani var sett í lógina: “Endamálið við hesi lógi miðjar ímóti at avmarka rúsdrekkanýtsluna og minka sum mest um skaðan, sum rúsdrekkanýtslan hevur við sær fyri einstaklingin og samfelagið og til tess at røkka hesum endamáli at áseta reglur í sambandi við rúsdrekka í Føroyum.”

Eg gangi út frá, at landsstýrismaðurin og Vinnumálaráðið biða løgtingið um at strika endamálið við rúsdrekkalógini.

Útvarpið boðaði í vikuni frá, at nógv ung hava einki arbeiði, so tað átti at verið nokk at trivið í hjá Vinnumálaráðnum.

Fyri stuttum var boðað frá í pressuni, at sølan av barnasodavatni frá Rúsuni við alkoholi í var eksploderað, so við nú at hava opið leygardag, so má mann væl royna at fáa tey eldru við eisini at seta met. So tað er kanska ikki so løgið, at freistingin at hava opið leygardag blívur so stór (pengar í kassan).

Stjórin í Rúsdrekkasøluni hamraðist um, at tað ikki kundi hava opið longu í morgin, leygardagin. So ein góð byrjan hevði væl verið næsta leygardag, páskaaftan.

Erliga hevði eg roknað við, at tá Sambandsflokkurin umsat rúsdrekkamál, at mann ikki fór at bróta við eitt 20 ára gamalt prinsipp um, at Rúsan ikki hevði opið um vikuskiftið, men man lærir so leingi man livir.

Hevur Fyribyrgingarráðið – núverandi Fólkaheilsuráðið – rátt til hesa stóru broyting í atkomiligheitini av rúsdrekka?